# Johan Norðfoss s
# síðan hann

**Tað er sera ymiskt, hvussu hvussu fólk eru fyri, tá ið tey eldast. Tað er eisini ymiskt, hvat tey fáa avrikað í aldurdóminum. Men Johan Norðfoss hevur seinastu sjey árini svomið teinin úr Føroyum til Íslands**



Johan Norðfoss hevur svomið 556 km í svimjihylinum í Havn. síðani hann fylti 80 ár

## Samrøða



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Vit hava hitt tann 87 ára gamla Johan Norðfoss í Havn, sum hevur eitt sjáldsamt avrik. Hann hevur nevniliga, síðan hann fylti 80 ár, svomið ein tein, sum svarar til leiðina millum Føroyar og Ísland, meira enn 300 fjórðingar.

Tá ið vit komu inn á gólvið hjá Johan og Emmy var høvuðsendamálið at fáa eina søgu um svimjing. Hana fingu vit eisini. Men Johan veit so ómetaliga nógv annað. Hann hevur siglt í nógv ár og hevur eisini upplivað nógv á sjónum. Hann hevur verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Við tí, hann kann greiða frá, er avgjørt grundarlag fyri fleiri frásagnum frá hansara munni.

### Hurðin mátti læsast tá dreingirnir vaskaðu upp

Johan er rættur havnarmaður. Pápi hansara var Albert, sum var sonur Dánjal í Horni. Í hesum javnstøðutíðum kann forteljast ein stuttlig søga úr Horni, sum Petra hjá Hannus hevur greitt frá. Teir vóru sjey beiggjar og bert ein systir. Tað stuttliga var, at fleiri av beiggjunum, og serliga Bernhard og Albert, vóru sera húsligir. Teir kundu hjálpa mammuni Elspu bæði at vaska og rudda. Men tá hetta var "skomm" fyri ein drong, mátti eingin sleppa ar síggja hetta í verki. Tí varð hurðin læst, áðrenn teir fóru til verka!

Johan er uppkallaður eftir einum pápabeiggja, sum var í donsku marinuni, men sum doyði av sponsku sjúku í 1918, 27 ára gamal. Hann er jarðaður í gamla kirkjugarði.

### Uppvaksin í Havn

Johan kennir væl viðurskifti í býnum, sum tey vóru fyrr. Tað er óneyðugt at siga, at Havnin tá ið Johan var ungur var ein heilt annar býur enn í dag.

Johan giftist ungur við Helenu, sum var úr Kvívík, og tey búsettust undir Gráasteini á trøðni hjá teimum. Hetta er enn nakað fjarskotið, men tá ið Johan bygdi har, hevur tað verið uttan fyri allan lóg og rætt. Fyrimunurin var, at tey búðu á trøðni, sum var ein partur av tilverugrundarlagnum. Tey høvdu kúgv beint við dyrnar, og her var hoyggjað, eisini beint fyri dyrnar.

Men skjótt kom vanlagnan. Johan var bert 26 ár, tá ið hann gjørdist einkjumaður, tá konan knapliga doyði. Nøkur ár seinni giftist hann aftur við Emmy, sum er ættað av Toftum, og eiga tey synirnar Allan, Sigmund og Hellan, sum allir eru sjómenn.

### Lærdi at svimja á Eiði

Í hesi grein verður bert høvi til at greiða frá svimjingingi hjá Johan. Fleiri av teimum í Horni dámdu væl at svimja, eisini Albert, pápin, og Hannus, pápabeiggin. Johan lærdi at svimja á Eiði. Mamma hansara Anna var ættað haðani, og hann plagdi at vera har norðuri og ferðast sum smádrongur. Her lærdi Johan at svimja niðri á Vatni ella Múlavík, sum tað var kallað. Tískil dugdi hann at svimja, áðrenn hann fór í skúla.

Í Havn vóru eingir svimjihyljar tá í tíðini, men svomið var í fleiri áum, sum tá vóru reinar og væl egnaðar til svimjing. Ein var Havnardalsá, ið rennur úr Havnardali. Her vóru fleiri smáir hyljar. Beint oman fyri gamla spinnaríð var ein hylur, bæði djúpur og reinur. Her var vatnhjólið, sum dreiv spinnaríið. Her dámdi Johan einki at svimja, tí sagt varð, at onkur var druknaður har, og at fossurin skuldi draga til sín!

Síðan vóru tað Marknagilsá, Havnará og Hoydalsá. Her lá Hoydalshylur, sum var roknaður fyri at vera ein fínur svimjihylur. Tað var eisini svomið á sjónum inni í vágunum, sum á Eystaruvág, í Vágsbotni og í Sandágerði.

### Fyrsta kappsvimjingin

Fyrsta kappsvimjingin hjá Johan var í 1930, tá ið hann var níggju ára gamal. Tað var Absalon Joensen, ættaður úr Gerðum í Klaksvík, sum skipaði fyri. Hann var upprunaliga prestur, men hevði eisini onnur áhugamál. Hann var eisini íðin myndatakari. Hann var í Íslandi sum prestur hjá føroyskum fiskimonnum í 1920-unum, og hesa tíðina tók hann nógvar manningarmyndir, sum eru gull verdar í dag. Nógvar vóru í síni tíð í FF-blaðnum, og tað eydnaðist at fáa sett nøvn á nógvar manningar.

Absalon hevði eisini áhuga fyri svimjing, og hann kom nakrar dagar fyri ólavsøku og bað Johan